

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 02 - 2013

# Danir vilja hava lut í grønlendska ævintýrinum

Tveir triðingar av danska fólkinum halda, at danska stjórnin og privatir íleggjarar, eitt nú pensjónsfeløgini, eiga at taka seg saman fyri at lut í ráevnunum í grønlendsku undirgrundini. Tað vísir ein kanning, sum Gallup hevur gjørt fyri Berlingaran. Greinarin Jens Jonatan Steen hjá hugsjónarstovninum Cevea sigur við blaðið, at úrslitið av kanningini er sum eitt "Wakeup-call" á donsku stjórnina. -Vit eiga at umhugsa møguleikan fyri almennum íløgum. Vit danir hava ligið sjóvarfallið av okkum. Vit hava søguligt tilknýti og ábyrgd mótvegis Grønlandi, sigur Jens Jonatan Steen. Skilir ikki danir Berlingarin hevur eisini tosað við Xiaogang Hu, sum er stjóri í námsfelagnum London Mining, sum stendur fremst í røðini av feløgum, sum eru til reiðar at fara ndir stórverkætlanir í Grønlandi. Stjórin sigur, at hann skilir als ikki, at nógvir danir hava eina so neiliga uppfatan av teirri kinesiskt fíggjaðu námsverkætlanini hjá felagnum. -Tann neiliga umrøðan ger samráðingarnar við møguligar íleggjarar truplar, sigur Xiaogang Hu. Hann heldur, at danir skuldu heldur verið stoltir av, at grønlendingar fáa ein møguleika til eitt betri lív, sum hann málber seg. Grønlendski landsstýrismaðurin í ráevnismálum, Ove Karl Berthelsen, sigur við Berlingaran, at skipið er ikki siglt undan dønum enn. Men sosialdemokratiski framsøgumaðurin í grønlendskum viðurskiftum, Flemming Møller Mortensen, sigur við blaðið, at tað kemur ikki upp á tal, at tann danski staturin skal gera íløgur í námsvinnu í Grønlandi.